## Christian um føroyskan mat

- Tær seinastu ferðirnar eg havi verið í Føroyum, havi eg roynt ymiskan føroyskan mat. Tá eg var barn, vildi eg einki royna. Seinast royndi eg lundar, og næst seinast var tað riv, og tað smakkaði væl. Skerpikjøt dámar mær eisini. Men ræstan fisk leggi eg einki í, turran fisk haldi eg vera eitt sindur for turran, men tað ringasta tú kanst bjóða mær er spik. Mær dámar annars væl lambakjøt, og í Føroyum er lambakjøtið so serliga gott.



## … um Lyngby Boldklub

- Eg haldi ófatiliga nógv av Lyngby Boldklub, eg kenni meg veruliga heima har. Vit hava í fimm ár megna at fingið felagið upp úr Danmarks Seriuni upp í SAS Ligaina, og tað haldi eg vera eksептionelt flott. Tað hevur ikki ligið nakað trýst á okkum, tí eingin hevði væntað, at tað fór at ganga somikið skjótt. Men við tíðini hava vit fingið størri ambitiónir, bæði leikarar, leiðsla og fjepparar. Eg havi tað sera gott við okkara fjepparum, og eg feiri øll míni mál saman við teimum.

# Eg eri eitt sindur føroy

**– Mamma mín hevur sett sín dám á meg og eisini restin av føroysku familjuni. Tá eg var barn, vóru vit annað hvørt ár í Havn og ferðaðust, og eg havi nógv góð minnir frá teirri tíðini, sigur Christian Lamhauge Holst, ið er uppvaksin í Danmark, men er blivin stjørna á føroyska fótbóltslandsliðnum**



– Eg vil ikki, at fótbólturin skal fylla alt. Eg lesi til lærara, og tað ætli eg mær at gera meg lidnan við, sigur Christian Lamahuge Holst. Mynd: Niels Uni Dam

## Samrøða




**Niels Uni Dam**
blaðmaður
nielsuni@sosialurin.fo


Hann er heitasta navnið í føroyskum landsliðsfótbólti í løtuni – Christian Lamhauge Holst . Vit hitta 25 ára gamla Lyngby leikaran uttan fyri kaféina Pixie á Eystarubrúgv í Keypmannahavn.

– Eg eri eitt sindur heimleysur í løtuni. Eg flutti úr eini íbúð fyri eini viku síðan og sleppi ikki inn í nýggju íbúðina fyrr enn um vikuskiftið. So eg sovi hjá vinfólkum, og so eri eg nógv á hesi kaféini, greiður Christian frá.

Hetta er tætt við Parkina í Keypmannahavn, har Christian í komandi undankappingum, um lutakastið vil tað so, kann enda við at spæla móti sínum egnu landsmonnum.

### Eitt sindur føroyskur

Hóast hann í barnaárunum var annað hvørt ár í Føroyum, og mamman er føroysk, so er eingin ivi um, at Christian er dani. Pápin er dani, og Christian hevur altíð búð í Danmark. Fyrst á Thurø tætt við Svendborg og seinastu fimm árini í Keypmannahavn.

– Men eg eri eisini eitt sindur føroyskur. Mamma mín hevur sett sín dám á meg og eisini restin av føroysku familjuni. Tá eg var barn, vóru vit annað hvørt ár í Havn og ferðaðust, og eg havi nógv góð minnir frá teirri tíðini. Tað var altíð stuttligt hjá mær at vitja ommu og abba, tí tað var eitt fótbóltsheim, har tey hildu við HB. Eg brúkti nógvar løtur í Gundadali á ferðunum hjá mær til Føroya, greiðir Christian frá, sum ikki er fyrsti landsliðsleikari í familjuni. Hann er systirsonur Eyðfinn Lamhauge, ið var lyklaleikari og vann hópin av meistaraheitum við HB frá 1968 til 1980. Mammubeiggin var eisini á landsliðnum.

### Góðar upplivingar

Tá Christian fekk tilboðið um at spæla við føroyska landsliðnum frá táverandi føroyska landsliðsvenjaranum, Henriki Larsen, ivaðist hann onga løtu í at svara játtandi. Hetta hóast henda avgerð samstundis merkir, at hann ongantíð kann umboða danska landsliðið.

– Dreyminum um at sleppa á danska landsliðið hevði eg slept fimtan ár frammanundan, so tað spældi slettis ikki inn í avgerðina. Eg sá tað sum eina spennandi avbjóðing og ein møguleika fyri at fáa nakrar upplivingar, og tær hava eisini verið góðar, greiðir Christian frá yvir um kaffiglasið.

Ein av hesum upplivingum var á Tórsvølli ímóti heimsmeistarunum úr Italia, tá Christian varð skiftur inn. Men hvussu er tað hjá einum leikara úr næstbestu donsku deildini at skula spæla ímóti heimsmeistarunum?

### Sum allir aðrir dystir

– Tað var ein risa uppliving! Innaní var eg átta ár aftur, eg hugsaði wauw, men royndi at goyma tað. Men tá eg kom á vøllin, so gloymdi eg alt um, at hetta vóru heimsstjørnur. So tað var meira í tankunum, og áðrenn eg slapp á vøllinum, at eg var ávirkaður av tí enn í veruleikanum. Satt at siga, so haldi eg ikki, hatta var nakað annarleiðis enn at spæla einhvønn annan dyst. Jú, tað er ein munur á, at tá vit spæla við Lyngby í Viasat Sport Divisionini, so hava vit bóltin alla tíðina. Men tað hava vit ikki á landsliðnum. Sjálvandi sæð burtur frá dystinum ímóti Skotlandi, sigur Christian flennandi.

Heima í Thurø eru foreldrini hjá Christiani bæði glað um luttøkuna á landsliðnum og errin av honum.

Ja, mamma mín var sera errin, tá hon hoyrdi, at eg skuldi umboða Føroyar á landsliðnum, men eisini pápi mín, sum er úr Keypmannahavn, var ótrúliga glaður mína vegna.

### Ein góð tíð

Christian er í góðum lag, henda morgunin vit hitta hann, hann tykist nærum friðsælur. Tað er eingin loyna, at Christian neyvan man hava havt betur tíðarskeið á fótbóltsvøllinum enn júst nú. Í Føroyum hevur hann spælt móti Italia og Skotlandi, og í Danmark hevur hann við Lyngby leygardagin tryggjað uppflyting í fremstu donsku deildina.

– Henda vikan er fyrst og fremst farin við at taka sær av løttum og at feira úrslitið leygardagin. Kappingarárini hjá okkara deild og SAS ligaini liggja forskotin, so tí fáa vit nærum onga summarfrítíð. Tað er sjálvandi keðiligt, so nú uppflytingin er tryggjað, leggja vit ikki ov nógv fyri við venjing og tílíkum.

### Fótbóltur fingið alsamt størri pláss

Góðu upplivingarnar á vøllinum seinastu tíðina eitt fyribils klimaks á eitt eina fótbóltsyrkisleið, ið byrjaði í Thurø Boldklub, tá Christian var fýra ár. Hann helt fram í Thurø, til hann var 12 ár og flutti til Svendborg , ið var stóra felagið har á leið. Tá hann 20 ára gamal flutti til Keypmannahavnar, leitaði hann eftir onkrum felagi, har hann kundi spæla fótbólt og hugna sær við tí.

– Tað var ikki við ætlanum um at flyta upp í SAS ligaina fimm ár eftir, at eg flutti til Lyngby. Tað er bara komið av sær sjálvum, og fótbólturin hevur alsamt fingið størri pláss, greiður hann frá.

Christian er hálvtíðarprofessionellur í Lyngby. Hann skal í næstum undir at samráðast um hvussu sáttmálin skal síggja út, tá felagið flytur upp í SAS liguna, men hann hevur ynski um, at hann heldur fram á hálvari tíð.

### Vil sleppa at læra

– Eg vil ikki, at fótbólturin skal fylla alt. Eg lesi til lærara, og tað ætli eg mær at gera meg lidnan

sosialurin